

# SØKT VERÐUR EFTIR SKRIVSTOVUFÓLKI TIL SMS

Søkt verður eftir fólki til skrivstovu okkara. Arbeiðið fevnir m.a. um alt vanligt skrivstovuarbeiði. Kassauppgerðir, avstemman, skuldara- og ognarabókhald. Tað er ein fyrimunur um umsøkjarin hevur royndir innan skrivstovuarbeiði, dugir at arbeiða við teldu, kann arbeiða sjálvstøðugt og ikki er bangin fyri at taka hond í har ástendur. Starvið er fulltíðarstarv og verður sett skjótast tilber.
Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Mary Husgaard, skrivstovuleiðara, telefon 31 30 41 ella teldupost mary@sms.fo.
Hevur hetta áhuga, so send okkum eina umsókn saman við uppýsingum um møguligar royndir v.m.

Umsóknir skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi mánadagin 3.desember.

SMS Skrivstovan · Postboks 1059 · 110 Tórshavn

SMS

Dogg





# Verkstaðsleiðari og bilmekanikarar

Til verkstað okkara sóknast vit eftir einum leiðara at hava dagligu fyriskipanina um hendi og eftir tveimum bilmekanikarum at arbeiða á verkstaðnum.

Verkstaðsleiðarin skal saman við leiðaranum samskipa, raðfesta, leiða og býta út uppgávur á verkstaðnum. Arbeiðsuppgávurnar fevna eisini um móttøku av viðskiftafólki og innskriving, eins væl og skráseting av uppgávum. Umráðandi er tí at duga at fáast við fólk og at kenna forritið Navision. Sum verkstaðsleiðari fært tú góðar arbeiðsumstøður til tær nógvu og krevjandi uppgávurnar.

Bilmekanikararnir mugu vera útlærdir á góðkendum verkstaði. Lætt lyndi og ágrýtni hava samstundis avgerandi týdning í dagliga arbeiðinum.

Vit leggja stóran dent á gott arbeiðsumhvørvi og góðan trivnað. Hinvegin krevja vit, at starvsfólk í størst møguligan mun kunnu arbeiða sjálvstøðugt, samstundis sum tey eru partur av einum toymi, har aðalmálið er valaverk til ein nøgdan skara av viðskiftafólki.

Lønar- og setanartreytir eftir nærri avtalu. Meira fæst at vita um størvini við at venda sær til Schumann Hjaltalin á tel 35 97 09.

Umsóknir við viðkomandi skjølum skulu vera okkum í hendi innan 15. des. 2007.

Audi SEAT mazda

**Bilasølan**
Vegurin langi · Postsmoga 3192 · FO-110 Tórshavn
Tel 359700 · bilasolan@bilasolan.fo

# Tekniska Skúla í Tórshavn tørvar 3 faklærarar

Talan er um størv á:
- Maskindeildini
- Bildeildini
- Trædeildini

Umsøkjarar, sum hava hægri útbúgving, kunnu hava fyrimun.



Vit vænta at umsøkjarar hava:
- Sveinabræv
- Viðkomandi royndir
- Hollan og dagførdan kunnleika

Vit bjóða:
- Spennandi og avbjóðandi størv í eimum umhvørvi, sum er í støðugari menning
- Møguleika fyri dagføring innan økið



Vit ynskja at umsøkjarar:
- Hava hug og hegni at arbeiða við ungdómi
- Kunnu arbeiða sjálvstøðugt og hava góð samstarvsevni
- Duga at loysa trupulleikar, tá ið á stendur
- Eru framfýsnir og kunnu geva íblástur at menna arbeiðsplássið

Setanaviðurskiftir:
- Størvini eru fulltíðarstørv at seta 7. januar 2008
- Lønar og sátmálaviðurskifti eru sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Tekniska Lærarafelag



Umsóknir, saman við upplýsingum um útbúgving, royndir og møgulig tilmæli, skulu vera Tekniska Skúla í Tórshavn, p.o.b. 3239, 110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi mánadagin 3. desember 2007.

Nærri fæst at vita um størvini við at venda sær til Jógvan Sørin Hansen, starvsfólkaleiðara, tlf 568070

TEKNISKI SKÚLIN
TÓRSHAVN